

Tórshavnar Stórband:

# Ein flott konsert og ein góð upphiting til ólavsøkuna

UMMÆLI

*Tróndur Enni*

Sunnudagin tann 26. juli fyri ólavsøku var eg til eina heldur forkunnuga og stórsligna konsert uttan fyri gamla meiraríið í Tórshavn.

Talan er um konsertina, sum Tórshavnar Stórband hevði, løgini vóru nýggj og gomul havnarløg, heilt frá Simma til Teit, øll løgini vóru útsett fyri stórorkestur av Magnussi Johannesen.

Frásøgumaður hendan dagin var eingin annar enn Robert McBirnie, ið trein á pall í besta stíli, svørtum klædningi við reyðum slipsi og góðum humori.

Fyrsta lagið var Déjà vu, eitt vakurt instrumentalt lag eftir Magnus Johannesen, eitt sveimandi lag, ja kanska heilt úr Havnuni út í heim og aftur. Hvør veit, tað er jú bara hugaheimurin, ið setur mørk, tá ið tað kemur til tónleikin.

Tað var heilt fitt á fólki komið saman til hesa forvitnissligu konsert, fleiri av andlitnum kundi ein kenna aftur úr føroyska tónleika lívinum, nokkso áhugavert. Næsta lagið var Mánalýsið, eitt nýtt lag eftir Magnus Johannesen, orðini átti Martin Joensen, á pallin hesa ferð kom Sólva Ford. Við einari mjúkari stemmu framførdi Sólva lagið, sera vakurt og melodiøskt.

So er tað James Olsen, ið Robert presenterar. Lagið, ið James syngur, eitur Nostalgi, aftur hesaferð er tónleikurin eftir Magnusi og Martini. James syngur millum annað um Konditt-aríið, har hann bestillir sær eitt lavkøkustykkið og eina sodavatn, ja tað er jú tann reina nostalgi, James er ein av okkara pionerum, tá tað kemur til tónleik. James hevur eina góða kennslu av, hvussu eitt lag skal svinga, og hettar lagið var einki undantak, flott framført við einari vokal improvisation og sínari sermerktu rødd, tó skal sigast, at ein kundi hóma, at røddin ikki var heilt frísk.

Eitt sum eyðkennir løg og arrangement hjá Magnusi, er at alt er sera væl skrúvað saman, flottar introir og outtroir, sum heild spennandi ljómar og løg. Eitt av teimun nýggjaru havnarløgunum á konsertini var lagið hjá Teiti, Havnin er ein lítil bygd, hettar lagið sang Finnur Jensen, og tað var meistarliga sungið og framført. Tað fimta lagið á konsertini framførdi Anna Nygaard, fitt, dansandi og charmerandi sang Anna lagið Rukkulív í London Town við einari rødd, ið spennir rættiliga vítt, annars stuttligt at síggja ein sangara, sum røkkur út yvir senukantin.

Karmarnir um konsertina vóru sera góðir, ein stór sena og eitt stórt ljóðannlegg, har tónleikararnir komu til sín rætt, tó kundi ljóðið verið eitt sindur betri, veit ikki heilt, hvat eg skal siga um tað, men kanska ov hart til tíðir.

Løgini sum vóru við á konsertini vóru millum annað, Kvøld á tinganesi eftir Terja Rasmussen og Anker Eli, Mær Leingist hjá Nicolinu á Kamarinum, og sjálvandi var lagið hjá Simma og Birna Dam, Eitt Sunnukvøld í plantasjuni við á konsertini.

Veðrið hendan dagin var gott, eitt sindur av sól, mjørkaflógvum og eitt sindur av sirmi, sum ein góður summardagur í Føroyum skal vera, men tað skal tó sigast, at tað klárnaði í til tað seinasta lagið, sum passandi var Til Havnar vit Fara, allir solistarnir trinu á páll við Roberti á odda. Hermann Jacobsen átti orðini, valsur traditionelt útsettur, hesaferð sang Robert fyri, og minti tað ikki sørt um Herman sjálvan.

Við so góðum tónleikarum sum Magnus Johannesen, Rógva á Rógvi, Edvard Debess, Heðin Z. Davidsen, Ólavi Olsen, Eiriki Skála, og Jens Knudsen fyri at nevna nakrar, so kann tað ikki ganga heilt galið.

Samanumtikið var hettar ein flott konsert, og ein góð upphiting til ólavsøkuna.













